Keypssamtøkan í Miðbýnum

FK í Dr. Jakobsensgøtu
sóknast eftir

# *Skrivstovu-fólki*

**til rakstrarskrivstovu okkara, at byrja 1. august ella eftir avtalu**

**Arbeiðstíð:** Mánadag til fríggjadag frá kl 8 til 16

Arbeiðið fevnir um alt skrivstovuarbeiði, hugsast kann í sambandi við ein matvøruhandil

**Løn:** Sambært S&K sáttmálanum

Meiri fæst at vita við at snúgva sær til Bo Møller, ella ringja á tel 217593

Skrivlig umsókn verður at senda í seinasta lagi 6. juli til

**FK Tórshavn**
**Att. Bo Møller**
**Dr. Jakobsensgøtu**
**Postboks 349**
**FO-110 Tórshavn**

ella sum teldupostur til: bm@fk.fo

Lesið
Sosialin
-so eru tit við!



sansir.fo

# KUNNINGARRÁÐGEVI

Starv sum kunningarráðgevi er leyst at søkja á Løgmansskrivstovuni frá 1. september, ella so skjótt til ber.

**Starvið**
Kunningarráðgevin skal í høvuðsheitum taka sær av kunningarvirksemi hjá Løgmansskrivstovuni. Hetta fevnir m.a. um at vegleiða og leggja til rættis kunning, hava samband við fjølmiðlar, arbeiða við heimasíðuni og evna til uppskot til politikk og virkisætlan fyri almenna kunning bæði í Føroyum og út í heim. Harumframt kunnu ávísar fyrisitingarligar uppgávur verða lagdar til kunningarráðgevan. Skipanarliga verður kunningarráðgevin partur av Ritaraeindini.

**Faklig førleikakrøv**
Vit vænta, at umsøkjarar hava miðlaútbúgving ella samfelagsvísundaliga útbúgving við eftirútbúgving innan miðlar ella samsvarandi royndir.

**Persónlig førleikakrøv**
Umsøkjarar skulu hava hollar arbeiðsroyndir, hava politiskt tev, góð samstarvsevni, vera tænastuhugaðir og lagaligir, miðvísir og duga at arbeiða sjálvstøðugt. Tað er fyrimunur at hava innlit í almennu fyrisitingina og hava arbeiðsroyndir innan tær uppgávur, ið liggja í starvinum. Umframt at duga væl at skriva skal viðkomandi vera stinnur í føroyskum og enskum máli.

**Løn og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært sáttmála millum Fíggjarmálaráðið og avvarðandi yrkisfelag, og setanarøkið fevnir um Løgmansskrivstovuna og stjórnarráðini. Roknast kann við, at arbeiðstíðin stundum fellur uttan fyri vanliga arbeiðstíð.

**Nærri upplýsingar um starvið**
Vinaliga setið tygum í samband við Marjuna Hanusardóttur, løgmansstjóra, tlf. 351030 ella 551030, at frætta meira um starvið.

**Umsóknir**
Umsóknir við prógvum, lívrensli (CV) og viðmælum skulu sendast til:

Løgmansskrivstovuni
Tinganesi
100 Tórshavn

ella í telduposti:

info@tinganes.fo

Umsóknir skulu vera Løgmansskrivstovuni í hendi í seinasta lagi 6. august 2007.

Løgmansskrivstovan stýðjar løgmanni í at stjórna landsstýrinum og hevur ábyrgdina av at fyrireika og fremja uppgávurnar, sum løgmaður hevur samsvarandi stýrisskipanini, nevniliga at samskipa og hava eftirlit við landsstýrinum, harumframt fyrisiting og uttanríkismál.

VIT DRAGA EINA LÍNU · VIT SETA SKYNSEMI Í HÁSÆTI · VIT VILJA VITA · VIT BRÓTA SLÓÐ

LØGMANSSKRIVSTOVAN
Prime Minister's Office

inni - trygt og ómaksleyst til hús



**Sethús – Brekkuskáki 7, Klaksvík**
Húsini eru í 2 hæddum - hvør hæddin er góðar 130 fermetrar, samlað búvídd er góðar 260 fermetrar. Grundøkið er 451 fermetrar. Byggiár: 1949. Húsini eru stoypt og klødd við alminiumplátum, takið er úr tjørupappi og varð skift í 2003. Í erva er durur, gongd, køkur, 2 stovur, 3 kømur, baðirúm og hjúnarúm. Í neðra er kjallararúm / fýr / vaskirúm og goymslurúm. Í íbúðini, sum er í neðra, er durur, køkur / stova, gongd, kamar, baðirúm og hjúnarrúm. Húsini standa mitt í býnum og hava sera gott útsýni. Garður er runt húsini. Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst.



**Sethús – undir Heygnum 11, Tórshavn**
Húsini eru í 2 hæddum - hvør á uml. 90 fermatrar - í alt uml. 180 fermetrar. Grundøkið er 400 fermetrar. Byggiár: 1960. Húsini eru nærum viðlíkahaldsfrí. Tak, klædningur, vindeygu, inndekningur og køkur í neðra frá mið 80'unum. Baðirúm og nýtt á gólvini í 2004. Niðara síða bjálvað og klødd við timbur og aluminium 2005. Í ovaru hædd er inngongd, durur, gongd / trappugongd / garderoba, matarkøkur / stova, hjúnarrúm við útgongd til stóran svala / terassu, baðirúm og 2 kømur. Í niðaru hædd er inngongd, durur, gongd, stova, køkur, baðirúm, kamar, vaskirúm / fýrrúm og stórur hjallur. Garður / urtagarður er runt húsini, sum eru hugnalig og charmerandi og standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi við hampiligum útsýni og góðum grannalagi. Stutt er til dagstovn og gott busssamband. Prísuppskot: kr. 2.000.000,00.



**Sethús – Janstovugøta 26, Tórshavn**
Húsini eru í 3 hæddum - hvør á 60 fermetrar - í alt 180 fermetrar. Grundøkið er 120 fermetrar. Byggiár: 1956 / 1997. Har er nýtt tak, klædningur, vindeygu, køkur, baðirúm, hjallur og øll niðara hæddin er dagførd. Í miðhæddini er hjallur, inngongd, gongd, baðirúm, matarkøkur, borðstova / stova. Í ovastu hædd er trappugongd, hjúnarrúm við útgongd til stóran svala við nakað av útsýni, baðirúm og 3 kømur. Í niðastu hædd er inngongd, gongd, 2 kømur, baðirúm og vaskikjallari. Húsini standa í veðurgóðum og friðarligum umhvørvi í miðbýnum nær við handlar, SMS, skúlar, dagstovnar, ítróttarøki, viðarlund o.m.a.

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 35 42 00 • Fax 35 42 01